## DAGSINS MEINING

# Sjálvsrannsakan

Tað eru sera álvarsamar atfinningar, sum í seinasta FF blaði undir heitinum Risi uttan hugburð verða settar fram móti føroysku pressuni, serstakliga Sosialinum. Vit verða skuldsett fyri at hava sleppt øllum okkara princippum fyri at kunna selja meira. Vit vilja tekkjast øllum og vit slúka alt rátt, sum kemur frá politisku flokkunum. Vit hava snøgt sagt offrað hugsjónina til fram fyri forrætningina. Tað er ikki hvør sum helst, ið kemur við hesum atfinningum, men sjálvur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, ið er kendur fyri sítt demokratiska sinnalag og sum ein, ið altíð hevur barst ímóti órættinum úti sum heima. Formaðurin er eisini úrmælingur sum samfelagsdebatørur og hevur mangan verið í hornatøkum við serstakliga høgravendar føroyskar politikkarar.

Leygarkvøldið var fyrsta trapputingið hildið í Miðlahúsinum og evnið fyri hesum tingið var í stóran mun tað sama sum verður tikið upp í FF blaðnum. Vit her á blaðnum hava sjálvsagt einki val: vit mugu fyrihalda okkum til hesar atfinningar. Taka vit trapputingið fyrst, har tveir fjølmiðlaúrmælingar løgdu fyri, so var niðurstøðan púra greið: pressan má og skal vera meira sjálvatfinnandi. Sjálvsatfinning er ein sjálvsagdur partur av virkseminum hjá eini vaknari og seriøsari pressu.

Hetta verður so ein partur av svarinum til FF blaðið. Vit síggja onga meining í at gera viðmerkingar til ítøkiligu dømini hjá blaðnum um vánaligan journalistikk í Sosialinum. Vit vilja heldur generelt vísa til hetta, at vit fegin alla tíðina ynskja at menna okkum og at gerast betri sum blað. Vit mugu viðganga, at tað verður gjørt alt ov lítið við at fara aftur um eitt nú tíðindaskriv frá politisku flokkunum og frá landstýrinum. Her noyðast vit at taka annað skinn um bak, serstakliga nú spindoktariar verða settir í landsstýri og í vinnufyritøkum. Spindoktarar hava lyndi til at stýra kunningini til almenningin. Sum tað so greitt kom fram á trapputingi, so setir hetta sera stór krøv til pressuna. Vit vera noydd til at liva upp til hesi krøv og mugu seta tilfeingi av til hetta økið.

Men vit fara samstundis at vísa nøkrum av atfinningunum hjá FF aftur. Vit hava her serstakliga í odda-greinum sett spurnartekin við politikk landsstýrisins og mangan funnist at vinnulívinum. Høvið hevur ofta júst verið tey tíðindaskriv, sum koma frá serstaklioga sama landsstýrinum. Men vit eru ivaleyst ikki farin nóg djúpt. Her mugu vit støðugt royna at gerast betri. At vit hinvegin vilja "tekkjast flest møguligum" fyri vinningin er ov hart sagt. Men vit skulu hinvegin í dag virka eftir marknaðartreytum: Vit fáa ongan stuðul av nøkrum slag, meðan bløðini í okkara grannalondum fáa útberingarstuðul og almennu føroysku loftmiðlarnir fáa milliónir í stuðli við lurtara- og hyggjaragjøldum, sum við lóg verður kravt frá borgarunum. Hetta merkir, at vit hvønn dag mugu framleiða eitt blað, sum kann seljast. Tað gevur tíverri ikki nógva orku til atfinnandi og djúptborandi skriving. Men vit eiga sum sagt at støðugt at royna at gerast ein betri pressa. Vit fara tí at raðfesta hesi øki, sum nu eru fyri atfinningum hægri í framtíðini og fara samstundis at bjóða øllum, sum hava sakligar og grundaðar atfinningar at skriva í blaðið og harvið hjálpa okkumk at gerast betri. At enda fara vit at takka FF blaðnum fyri tann positiva anda, sum hóast alt eyðkennir greinina og fyri tey vøkru orð, sum eisini eru í somu grein.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Afturlatingarlógin sum hálvavegna tók atlit til halgidagslógina

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna*



Viðgjørdu í tinginum lóg um afturlatingartíðir hjá handlum. Álit frá samdari vinnunevnd var framlagt, við uppskoti um broytingar í mun til lógina sum landsstýrismaðurin hevði lagt fyri tingið. Broytingaruppskotið gekk út uppá at handlum ikki skuldi verða loyvt at hava opið millum kl. 10.00 og 14.00 sunnudagar.

Havi stóra virðing fyri at vit hava eina halgidagslóg og ein sunnudag har fólk hava høvi at steðga á, hvíla og venda hugin frá tí verðsliga og til tað andaligu føðina. Haldi eisini at so skal vera framyvir.

Men harífrá og so til at fara at løggeva í hesum landinum fyri hvat fólk skulu og kunnu ella ikki, tykist mær at vera at fara í so langt, serliga tá vit hugsa um, at í tí framkomna samfelagnum vit liva í í dag, eru nógvir ymiskir aðrir mátar at handla uppá, enn við bert eini útsølu í einum handli. Vit hava internet handlar, telefonhandil, sjálvtøku handil o.s. fr. Hesum handli fær tú ikki steðga við lógarbroytingini sum liggur í tinginum.

**Hálv atlit**
Kanska er broytingaruppskotið eisini bara ein váttan um at vit bara hálvavegna taka halgidagslógina í álvara, hví loyva handli ein part av degnum og ikki ein annan part av degnum? Her haldi eg uppskotið dettur sundur, tí meinar tingi at dagurin skal haldast heilagur í mun til handil henda dag, so er jú allur sunnudagurin heilagur og ikki bert ein partur av sunnudegnum.

Hetta førir so til spurningin um hvat so við øllum øðrum virksemi sum fer fram sunnudag?

Ítróttur? Lossing og landing? Vasking? Yrkisframførslur av sjónleiki og tónleiki? Filmsýningar? Tað er ongin endi á virksemi sum fer fram í samfelagnum sunnudag, og umframt hetta, er nógv virksemi neyðugt, hugsa bert um sjúkrahús, røkt, samferðslu, fyri at nevna nøkur øki.

**Samvitskan**
Tíðirnar broytast eins og samfelagið broytist, okkara uppgáva er allatíðina at duga at tillaga okkum og okkara skipanir til nýggju tíðirnar. At venda aftur til eina farna tíð fer ongantíð at eydnast við heppni. Vóni ikki afturhaldskreftirnar fara at vinna á vanliga skynseminum hjá tingfólki, tí í seinasta enda verður tað bert samvitskan hjá tí einstaka borgaranum í landinum, sum fer at vinna, og henni hevur tingið ikki lógarheimild yvir.

# Fyrispurningur til Bjarna Djurholm, landstýrismann í landbúnaðarmálum

**Olaf í Garði Joensen**
*Pt. Løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin.*



Av tí at eg varð ov seinur at seta fyrispurningin í løgtinginum 13 Apríl 2005, loyvið eg mær at seta spurningin alment í bløðunum.

Í samband við at alt fleiri kommunur hava ætlannir um at vetrarfriða býir/bygdir, vita vit at yvirliggjandi hagið missir vetrarbitið. Kommunan rindar so fyri mist vetrarbit. Men tað sum er undranarsamt, er, at yvirliggjandi hagi ikki fær peningin fyri lendiið, ið verður vetrarfriða, men í staðin verða pengarnir fluttir á konto hjá Búnaðargrunninum.. Hettar førir so tað við sær, at tey sum eiga lendið, ið verður friðað, ikki uttan víðari ganga við til vetrarfriðing.

**Spurningur 1.**
Kann hagið, sum missir vetrarbit, søkja um at fáa peningin aftur frá Búnaðargrunninum? Um ja, so undir hvørjum treytum?

**Spurningur 2.**
Kann hagið sum eigur pening á bók, eisini søkja?

Fari til seinast, at heita á Bjarna Djurholm, landsstýrismann í búnaðarmálum, um at broyta lógina um vetrarfriðing soleiðis, at tað kemur at vera tann hagin, sum missir vetrarbitið, ið fær peningin.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.